






og var tað ein sjón, ið ikki fer úr minninum aftur. Reyðgulur var himmalin allur, og sólin sum ein appelsin. Slíkt er heilsubót fyri likam og sál.

Meðan vakra sjónin stóð, sungu fólk eittnú Føroyar og Lítið yvir Føroya land. Eisini varð dúgliga tosað og gitt um, hvør handan ella handan oyggin var, ella hatta fjallið ella hasin tangin, og at enda var niðurstøðan, at har vit stóðu á lítla blettinum í sólgylta havinum, sóu vit nærum allar oyggjar í Føroyum, heilt norður til norðatu Norðoyggjar, og kanska var onkur einstøk oyggj, ið lá afturundir, men tey kønastu hildu seg telja eini 16 ella 17 oyggjar. So klárt var í veðrinum, og so væl sæst kring landið. Hugvekjandi, tá ein stendur á einum bletti, ið er 0,8 m2 til støddar.

Um fimm tíðina sunnumorgun 21. juni var sungin morgunsongur – sangur um Lítlu Dímun, alt meðan morgunroðin litaði lofthavið.

So varð pakkað, og ferðin niður av oynni byrjaði. Oman bróttu líðina aftur, og so eftir rás til annað og nýggjari hús. Har var eisini staðið, har vit skuldu síga niður av oynni. Tey sum vildu, sjálvsagt. Men væl gekk, og at enda kom hvør og ein av ferðafólkunum av oynni hangandi í línu við sterkum og væl talandi hvalbingum á tromini.

Undir bíðaði árabátur, og so var at sleppa sær umborð á Johonnu. Tá øll vóru umborð á Johonnu, setti sluppin kós á Hvalba, ferðalagið sang "Og tøkk at tú meg hevur vart..", tá lagt varð at bryggju, og í Roynhøllini bíðaði heit súpan við kjøtbollum. Frálíkt!

Tøkk fái hvalbingar fyri túrin!! Hann er ógloymandi, og kann ikki lýsast í orðum, har eru myndirnar meira sigandi. Og sterkastar eru myndirnar, ið goymast í huganum, tí slíkt skal upplivast.

Einasti vandi er nú, at hvørjaferð siglt verður við Smyrli framvið Lítlu Dímun, og ein av okkum 50 í ferðalagnum er umborð, so verður óúthaldiligt at sita okkum við lið, tí so nógv verður óivað reypað av ferðini í Lítlu Dímun í longsta degi í 2009.

*(Myndir: Dagfinn Olsen, Esther Suðuroy, Aslaug Suðuroy, Øssur Mørk)*


